# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# »BLINDUR ER BÓKLEYSUR MAÐUR«

Soleiðis sigur orðatakið – og tí var tað so hugaligt at lesa í Sosialinum um vikuskiftið um orðblind fólk, sum hava fingið góða hjálp.

Men hinvegin var tað meira hugstoytandi at lesa um skúlagongdina, hjá teimum báðum fólkum, sum blaðið hitti í hesum sambandi. Kvinnan greiddi frá, at hon í fólkaskúlanum alt ov ofta upplivdi, at hon ikki slapp at lesa upp, tí tað tók henni ov langa tíð, og hon varð heldur ikki biðin um at koma upp til talvuna av somu orsøk. Hon føldi tað, sum um hon varð lopin um í skúlanum.

Maðurin greiddi frá, at hann helt seg bara vera dovnan, hann visti ikki, at hann var orðblindur. Tá ein lærari beyð honum hjálp, fekk hansara egna treiskni hann at lesa. Hann fór á Tekniska skúla, har hann fekk góða hjálp.

Kvinnan fór á Heilsuskúlan í Suðuroy, har hon fekk góða hjálp og gjøgnumførdi útbúgvingina við einum tíggjutali í miðal.

Hesar søgurnar vísa, at hetta er eitt øki, sum vit øll eiga at taka í størri álvara, tí júst hetta brekið man hava volt mongum trupulleikar – trupulleikar, sum hava broytt framtíðina munandi, tí tann starvsleiðin, sum onkur hevði hugsað sær, ikki kundi troytast, tí orðblindni forðaði tí.

Nú skulu vit sjálvandi vera varin við at leggja ov stórar byrðar og ábyrgdir á skúlan. Men eyðsæð er, at orðblindni er ein trupulleiki, sum skúlin eigur at taka í størsta álvara. Tað er ein trupulleiki, sum fær so stórar avleiðingar – og sum kann loysast.

Tað er sera gott at Lions við Rasmus Magnussen á odda hava sett fokus á hendan trupulleikan. At fólk, sum sjálv eru orðblind, og ikki smæðast við at greiða frá, er sera avgerandi. Lansstýriskvinnan í mentamálum segði í blaðnum fríggjadagin, at alt byrjaði við ráðstevnuni, sum Lions tók stig til – og hetta førdi til, at farið var undir at útbúgva lærarar at undirvísa orðblindum og lesi- og skriviveikum.




Tað er sera hugaligt, at myndugleikarnir á henda hátt gera nakað við trupulleikan innan skúlans gátt. Tað hevur ikki minni týdning, at vit øll onnur, bæði foreldur og skúlanæmingar, eru tilvitað um trupulleikan og læra, hvussu vit skulu vera um fólk, sum hava hendan trupulleikan. Klára vit tað, so er so ómetaliga nógv vunnið, og um skúlin samstundis kann geva næmingunum ta hjálp, sum skal til, so vinna vit nógvar sigrar.

## » Nógv kend – listafólk, uppfinnarar og politikarar, eru orðblind

# Fleiri lærupláss í fjør

Í 2010 vóru skrivaðir 215 nýggir lærlingasáttmálar. Hetta er munandi meira enn árið fyri, tá talið einans var 157.

Yrkisdepilin hevur nú gjørt yvirlit hevur endaligu lærlingasáttmálarnar fyri 2010.

Samlaða lærlingatilgongdin í 2010 var 215 lærlingar, og er tað munandi fleiri lærusáttmálar enn í 2009, tá tilgongdin fall til 157 lærlingar.

– At tilgongdin er hækkað í 2010 sæst aftur í Eysturoy, Suðursteymoy, og Norðoyggjum. Tað er serliga í byggiyrkinum, el- og samskiftisyrkinum, metalyrkinum og tænastu- og tilvirkisyrkinum, at framgongdin er.

**Lærlingatilgongdin 2010 býtt uppá landaøkir**

| Yrki | Íalt | Eystur-oy | Norð-oyggjar | Norð-streym | Sandoy | Suðuroy | Suður-streym | Vágoy |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Byggiyrkið | 47 | 12 | 10 | 6 | 2 | 3 | 13 | 1 |
| El- og samskiftisyrkið | 22 | 7 | 4 | 2 | 0 | 1 | 6 | 2 |
| Fiskaídnaðar-, land- og havbúnaðaryrkið | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Flutningsyrkið | 12 | 2 | 0 | 1 | 1 | 1 | 7 | 0 |
| Grafiska- og miðlayrkið | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Handils- og skrivstovuyrkið | 64 | 16 | 6 | 6 | 0 | 2 | 32 | 2 |
| Matvøruyrkið | 16 | 6 | 1 | 1 | 0 | 1 | 6 | 1 |
| Metallyrkið | 33 | 8 | 7 | 1 | 0 | 5 | 12 | 0 |
| Tænastu- og tilvirkisyrkið | 20 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 | 14 | 3 |
| **Tilsamans** | **215** | **54** | **28** | **18** | **3** | **13** | **90** | **9** |

# Fyrra helvt at Sement av

Um vikuskiftið var fyrra helvt av tónleikakappingini Sement. Sement er ein kapping, har nýggir bólkar og einstaklingar, ofta kalla garagubólkar sleppa at royna seg.

Fyriskiparanir, sum er Margarinfabrikkin í Havn, siga at tey eru væl nøgd við gongdina av tiltakinum higartil. 19 bólkar eru tilmeldaðir og 13 bólkar royndu seg um vikuskiftið. Fríggjakvøldið spældu seks bólkar og tveir komu bólkar víðari til finaluna og eru teir A Blue Journey og Hvítt uppá Svart.

Leygarkvøldið vóru sjey bólkar á palli, og tá vóru tað Incurse og Júrginn sum vunnu finalupláss og sostatt skulu royna seg saman við seks øðrum bólkum til finaluna komandi leygarkvøld 5. feb.

Sigast kann at tónleikastílirnir eru sera fjølbroyttir og umboðanin er úr øllum landinum. Hetta siga fyriskiparanir seg frøast um, og at júst hetta eisini er eitt av aðalmálunum við kappingini Sement.

Margarinfabrikkin kennir tað sum eina týdningarmikla uppgávu at geva ungum óroyndum bólkum møguleikan at royna seg við at skriva tekstir, gera løg og ikki minni at royna seg á palli, og er júst hetta tiltakið ein gyltur møguleiki til tað, siga tey úr Margarinfabrikkini.

Komandi vikuskiftið verður so endabresturin við seinasta innleiðandi umfarinum fríggjakvøldið og finalan leygarkvøldið. Tiltakið byrjar bæði kvøldini kl. 20.00



## » Krakkaveldi fram um borgara

THOMAS ARABO
KJAK Á SÍÐU 10



## » Talgildar borgaratænastur

EYÐUN MØRKØRE
KJAK Á SÍÐU 30



# Heðin flestar atkvøður

Í VikuskiftisSosialinum 7. januar í ár skipaðu vit fyri eini sms-kapping um, hvat av teimum 14 listarverkunum, sum vóru við í kappingini um at prýða uttan fyri fimleikarhøllini Fimi á Tórsvølli.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt av, at ávísur partur av hvørjari stórari verkætlan skal brúkast til listprýði. Hetta er gjørt í Skúlanum við Løgmannabreyt, verður gjørt í Skúlanum á Argjahamri og nú eisini í Fimi.

Uppskotið hjá Guðrið Poulsen vann kappingina, men øll hini verkini vóru sýnd fram á framsýning í Fimi í januarmánaði, og tað var í hesum sambandi, at lesarar kundu siga sína hugsan.

| *Nr.* | *Listarfólk* | *Atkv.* | *prosent* |
|---|---|---|---|
| 2 | Heðin Ferjá Heldarskarð | 29 | 42,0 |
| 14 | Ole Wich | 15 | 21,7 |
| 3 | Jógvan Horn | 5 | 7,2 |
| 6 | Bjørn Nørgaard | 5 | 7,2 |
| 8 | Tróndur Patursson | 5 | 7,2 |
| 9 | Grótvirkið í Skopun | 5 | 7,2 |
| 1 | Brandur Patursson | 2 | 2,9 |
| 7 | Eyðun Dal-Christiansen | 2 | 2,9 |
| 12 | Eli Smith og Jákup Eli á L | 1 | 1,4 |
| 4 | Finnleif Mortensen | 0 | 0,0 |
| 5 | Gianfranco Nonne | 0 | 0,0 |
| 10 | Guðrið Poulsen | 0 | 0,0 |
| 11 | Jóna Rasmussen | 0 | 0,0 |
| 13 | Ole Wich | 0 | 0,0 |
| | | **69** | **100** |

Á fyrsta plássi kom Heðin Ferjá Heldarskarð við 42 prosentum, á øðrum plássi Ole Wich við 21,7 prosentum meðan fýra onnur komu á triðja pláss.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*